# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Ellisakfør í Tórsgøtu




*Bedford brandbilurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði frá 1948*

**ELLISAKFØR** Flaggdagin var Tórsgøta partur av hátíðarhaldinum í miðbýnum í Havn, tá ellisakfør vórðu sýnd fram í gøtuni

Hetta er 20 árið á rað, at Føroya Ellisakfør sýnir fram síni gomlu akfør á flaggdegnum. Tórsgøta var stongd av fyri allari ferðslu, so fólk kundu skoða gomlu akførini í friði og náðum. Á framsýningini vóru bæði motorsúkklur og bilar av ymiskum sløgum og í øllum aldri.

Bilurin sum vakti størst ans í Tórsgøtu var helst tann nýístandsetti Bedford brandbilurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði. Bilurin, sum varð keyptur sum nýggjur í 1948, er nú gjørdur í upprunaligan stand og sær út sum nýggjur.

*maggi@sosialurin.fo*




# MC-framsýning í SMS

**MOTORSÚKKLUR** Frá týsdegnum 26. til leygardagin 30. apríl hava Føroya-MC, MC-Sølan og AD-Import framsýning á Torginum í SMS

Føroya MC fer m.a. at sýna motorsúkklur fram hjá limum felagsins – bæði vanligar motorsúkklur og eisini súkklur frá kappingum í Føroyum og uttanlands. Motorsúkkluforhandlararnir MC-Sølan og AD-Import hava hvør sín bás við ymiskum frá teirra handlum.

Leygardagin endar tiltakið við PowerMeet fyri motorsúkklur í ymiskum støddum uttan fyri SMS kl. 12. Frá kl. 13-16 verður motorsúkklukoyring fyri børn á 4-hjólarum.

